

*Tá talið av misnýttum dønum var komið upp á 17, lovaði Czeslaw Kozon, katólskur bispur í Danmark, at kirkjan skuldi seta eina kanning um kynsliga misnýtslu í donsku kirkjuni í verk. Men eftir, at bæði miðlar og politikarar funnust harðliga at hesum, hevur bispurin nú játtað at lata løgregluni málini til kanningar. Czeslaw Kozon, sum her er avmyndaður í kirkjuligum høpi, hevur onki tilknýtið við pedofilimálini.*

*Mynd: Polfoto*

## SEXUELT MISBRÚK AV BØRNUM Í KATÓLSKU KIRKJUNI

- **Fleiri katólskar kirkjur í Europa hava verið raktar av umfatandi pedofilimálum.**
- **Misnýtslan er farin fram yvir fleiri ártíggju og hevur verið duld sum mansmorð.**
- **Seinastu árini eru alt fleiri mál komin fram í ljósmálan.**
- **Nú eru eisini hundraðtals offur komin undan kavi í Hollandi, Týsklandi, Danmark og Eysturríki.**
- **Bara í Írlandi hava 14.500 børn verið í klørnum á katólsku prestunum.**
- **Seinasta vikuskiftið bað Benedikt XVI, pávi, írsku ofrini um umbering fyri illgerðirnar.**
- **Í Týsklandi eru pedofilmál komin undan kavi í 19 av 27 sóknum. Eitt nú hava tveir prestar misbrúkt børn í einum jesuittaskúla í 1970'unum og 1980'unum.**
- **Fleiri gølur hava verið í Eysturríki. Millum annað eitt mál um ein prest, sum í fleiri ár hevur misbrúkt børn í einum klostri í Salzburg. Eisini er komið undan kavi, at fleiri tilburðir hava verið í víðagitna dreingjakórinum í Wien.**
- **Í Hollandi er kanning sett í verk eftir at 200 persónar hava ákært prestar í katólsku kirkjuni fyri misbrúk í 1960'unum og 1970'unum.**
- **Gølan hevur eisini gjørt um seg í katólsku kirkjuni í USA. Amerikanska kirkjan hevur rindað tvær milliardir dollarar í endurgjaldi til offur fyri sexuellum misbrúki síðan 1992.**
- **Australia, Póland, Spania, Frakland, Canada, Mexico og Senegal hava eisini verið rakt av umfatandi pedofilgølum innan kirkjunnar gátt.**

*ritzau/AFP*

greinina við at mæla til, at onkur tosar nøkur álvarsorð við pávan.

- Kirkja og sex hava avgjørt samband við hvørt annað. Men tað skal vera ordiligt sex. Ikki sex í barnahædd.

### Katolikkar í øðini

Í aftursvari til kronikkin hjá Lindhardt siga fleiri katólskir prestar, at sølibatið er ein gáva frá Gudi, og at tónin hjá Lindhardt kennist sum runublaking og er bæði niðrandi og spottandi.

Daniel Nørgaard, sum er prestur í katólsku dómkirkjuni í Keypmannahavn, Sankt Ansgars Kirke, krevur eina umbering frá Lindhardt.

– Hansara argumentatión minnir um hana hjá høvundanum Lars Hedegaards, sum sker allar muslimar yvir ein kamb og sigur at allir muslimskir pápar neyðtaka døtur sínar.

### Onki samband við hvørt annað

Katólski bispurin í Danmark, Czeslaw Kozon, heldur tað vera skeivt at Jan Lindhardt krøkir sølibat og pedofili saman.

– Hóast sexuella misnýtslan er syrgilig, so eiga atfinningarnar og kjakið at vera á einum sakligum støði. Og tað er skeivt at tengja sølibatið saman við pedofili, sigur katólski bispurin í Kristeligt Dagblad.

Hann vil vera við, at um ein maður hevur pedofilar lystir, so er tað nakað, sum hann tekur við sær inn í prestagerningin. Hugurin til børn verður ikki stimbraður av sølibata liviháttinum.

- Tað eru eisini gift fólk, sum eru pedofil, og tey hava ikki skyldu til at liva í sølibat, sigur Czeslaw Kozon, sum vil vera við, at sexuella misnýtslan í kirkjunum er framd av einari ela-lítlum minniluta av prestunum.

### Avtakið hjúnalagið

Í einari viðmerking í sama blaðið, sigur katólski presturin, Benny Blumensaat, at sølibat hevur verið ákært fyri at vera orsøkin til nógvar skeivar gerðir. Men kortini eigur tað ikki at verða tikið av, heldur hann.

- Hvat so við pedofilum tilburðum, sum fara fram innan hjúnalagið? Skulu vit so eisini avtaka hjúnalagið? Men tað er man jú eisini væl áleiðis við í fólkakirkjuni, sigur hann speirekandi.

FAKTA

**Sølibat merkir kynsligt fráhald**

# Søgan um sølibat

Til umleið ár 1000 vóru næstan allir prestar, sum ikki vóru munkar, giftir. Líka til tá hevði sølibat bert verið galdandi fyri munkar og nunnur, sum høvdu Jesus og Paulus sum fyrimyndir, eins og at kristnu, puritansku einbúgvarnir í oyðumørkini eisini vóru fyrimyndir.

Tað var pávi Gregor VII (uml. 1020-85), sum setti sølibatið í verk við kirkjuligari fyriskipan.

Orsøkin til sølibatfyriskipanina var, at pávin hevði mist tamarhaldið á giftu prestunum.

Tá á døgum snúði hjúnabandið seg ikki um unga parið, men um familjuna. Gifti presturin seg inn í eina máttmikla familju, mátti hann røkja familjuna fram um kirkjuna og pávan.

Sølibatið tænti eisini einum fíggjarligum endamálið. Var prestur giftur, tá hann doyði, fekk familjan arvin og ikki kirkjan.

Sostatt tænti sølibatið bæði einum disiplinerum og fíggjarligum endamáli.

*Kelda: Bent Oftestad, katolikkur og professari í kirkjusøgu á teologiska meiningheitsfakultetinum í Oslo í Kristeligt Dagblad.*